Starvslýsing

Heimatænastan

## Kostrøktarstarvsfólk til Heimatænastuna Sandoyar Øki

Sókt verður eftir køksassistenti (ernærings-assistent) til Heimatænastuna Sandoyar Øki.

Eitt fast starv sum køksassistenur á setanabrøki 0,5 av fullari tíð, er leyst at søkja frá 1. nov. 2008.

**Starvsøkið fevnir um**
- 3 bústovnar og avmarkaða matútberan.

**Næsti leiðari**
- Økisleiðarin

**Arbeiðsuppgávurnar fevna um**
- Matgerð, sum í mestan mun fer fram á røktarheiminum á Sandi
- Innkeyp av mati til bústovnarnar
- Gera kostætlan til bústovnarnar
- Áhaldandi menna og kunna seg um kost í mun til tørvin hjá búfólkunum
- Samstarva við aðrar fakbólkar.

Heimatænastan í Sandoyar Øki er ein skipan, har heimarøkt, røktarheims-og sambýlisrøkt er samskipað, og har røktarstarvsfólk starva bæði á stovnum og úti í økinum.

**Vit kunnu bjóðað**
- eitt spennandi og mennandi starv har arbeitt verður tvørfakligt.
- eitt starv við skiftandi avbjóðingum
- eitt starv í einum øki, sum er í støðugari menning.

Nærri fast at vita við at venda sær til økisleiðaran Ásu Davidsen á tlf. 213890 og á heimasíðuni hjá Nærverkinum: www.naerverk.fo.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráði og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsóknin við avriti av próvskjølum og CV skulu sendast til:
Heimatænastan Sandoyar Øki
Miðgøta 8
210 Sandur

**Umsóknarfreist: 26/9- 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo




Í Landsmiðstøðini er eitt starv sum skriv-stovufólk leyst at seta frá 1. oktober 2008 ella skjótast til ber.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um avgreiðslu av viðskiftafólki, útlán av undirvísingarmiðlum, røkt av bókasøvnum og ymiskt praktiskt arbeiði í sambandi við skeiðsvirksemi. Starvið fevnir eisini um bókhald og avgreiðslu um FSL-skipanina hjá Føroya Gjaldstovu.

Vit sóknast eftir fólki, sum hevur
- skrivstovuútbúgving/royndir við skrivstovuarbeiði
- viðkomandi arbeiðsroyndir, eitt nú frá bókasavni og/ella við bókhaldi
- førleika og áhuga í at nýta teldu í arbeiðinum
- kunnleika til Aleph ella aðra líknandi bókasavnsskipan.

Lýkur tú øll ella flestu førleikakrøvini omanfyri, dámar tær at abeiða sjálvstøðugt, ert tú røkin og tænastuhugað/-ur, hevur tú góð samstarvsevni og hevur tú lætt við at samskifta við fólk, er tað helst teg okkum tørvar.

Vit kunnu bjóða eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv í einum stovni, sum hevur samskifti við flestu skúlar og lærarar í landinum, og sum hevur samstarv við eitt nú Mentamálaráðið, Landsbókasavnið og Føroya Gjaldstovu.

Talan er um starv í fulla tíð. Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Petur Simonsen, stjóra í Landsmiðstøðini, tlf. 356850 ella 220414.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir v.m. skulu vera Landsmiðstøðini í hendi í seinasta lagi mikudagin 17. september 2008.

**Landsmiðstøðin**
Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3084
FO-110 Tórshavn
www.lms.fo • lms@lms.fo

www.lms.fo Landsmiðstøðin

Landsmiðstøðin er stovnur undir Mentamálaráðnum, sum veitir tænastur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, veitir fakliga og námsliga ráðgeving, skipar fyri eftirútbúgving av lærarum og hevur námsligan verkstað.

LR www.sosialurin.fo

## Tiltak í miðlahúsinum um slanking

## Eitt slankari og sunnari lív

**Sunnudagin 21. september kl. 14 – 18**




LR skipar fyri einum tiltakið í Miðlahúsinum sunnudagin 21. september.

Á skránni er t.d. fyrilestur hjá íslendsku Halldóru, sum hevur tapt 22 kilo, umfram annað upplýsandi um LR og væl umtókta slankivøruna; FiguAktiv.

Ert tú ein av teimum, ið ynskir eitt slankari og sunnari lív, hevur tú nú møguleikan.

Tilmelding fer fram hjá Janu á tel. 517100 / 317100 ella lr@kallnet.fo

**Les meira á www.lr.fo**



Tórsgøta 1 · Tel 34 18 00 · Fax 34 18 01
post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo

miðlahúsið í Vágsbotni

Nú fara vit til

# NESVÍKAR!

Bygdarlega fyri Kvíkvíkar sókn

## Lega fyri øll:

**Familjur, ung og gomul, børn og vaksin, støk og pør....**

Legan verður sett í Nesvík **fríggjakvøldið 3. okt. 2008**

kl 20.00 (koma frá kl. 19.00), og vit fara til húsar aftur sunnudag 5. okt. aftan á kirkjugongd og døgurða.

Á skránni verður ymiskt til gaman og álvara:

***Vónandi verður góð undirtøka!***

Tit skulu hava soviposa ella dýnu við, handklæði, tannbust osfr.

**Kostnaður:**
Vaksin kr. 200,
børn frá 7 til 14 ár kr. 50.

**Tilmelding hjá:**
Jóhonnu 421269 ella 227701
Grækaris 421265 ella 212265
Ara 421466 ella 219075
Rannvá 421280 ella 266133
Hans Jákup 421238
Elin-Mariu 421171 ella 503258

## Húsvognur til sølu

Adria Adiva 502 UP frá juni 2006 við nýggjum fortelti. Vognurin er sum nýggjur. Hevur m.a hita í gólvi og 20"flatskerm við DVD.

Søluprísur 113.000.-

**Tel. 21 63 64**

i

Sosialurin